## MAZDA 323F



Frá apríl 1996, koyrt 130.000 km, grønur, v/powerstýring, aircondition, centrallás. Sera vælhildin bilur.

**Selist um hóskandi boð fæst**

☎ 51 13 75

Sosialurin 341800

## Mercedes Benz 200 D



Árgang 1966, koyrt 88.000 km, reyður, diesel. Ellisakfar í góðum standi. Bilurin er høvuðsumvældur og lakkeraður fyri trimum árum síðani.

## Opel Kadett



Árgang 1973, einans koyrt 54.000 km, reyður, bensin. Bilurin er í sera góðum standi. Hevur havt ein eigara tey fyrstu 28 árini.

## Mercedes Benz 280 CE



Árgang 1978, koyrt 104.000 km, gráur, bensin, 185 HK, 2800 cc, 6 cyl. rekkjumotor. Bilurin er í góðum standi.

☎ **Ringið 216409**

# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**BMW 318TDS 5H**
Árg 1997, Km 146.000. mynd manglar. *Prísur fyrr Kr. 125.000* – **Nú sertilboð uttan bil í býti 105.000,-**



**CITROEN C3 1.4HDI PRESTIGE**
Árg 2002, Km 66.000. *Prísur fyrr Kr. 120.000* – **Nú sertilboð uttan bil í býti 100.000,-**



**CITROEN XANTIA 2,0HDI**
Árg 1999, Km 103.000. *Prísur fyrr Kr. 110.000* – **Nú sertilboð uttan bil í býti 90.000,-**



**OPEL ASTRA 2.0TDI STC**
Árg 2000, Km 116.000. **Kr. 115.000,-**

**HYUNDAI ACCENT 13I 3H**
Árg 2000, Km 71.000. **Kr. 75.000,-**



**MITSUBISHI LANCER 1,3I**
Árg 1998, Km 55.000. mynd manglar. **Kr. 68.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0D4-D 4H**
Árg 2001, Km 72.000. mynd manglar. *Prísur fyrr Kr. 140.000* – **Nú sertilboð uttan bil í býti 120.000,-**



**CITROEN XSARA 2.0HDI 110HK**
Árg 2000, Km 118.000. **Kr. 110.000,-**



**NISSAN ALMERA 1,5I**
Árg 2003, Km 24.000. mynd manglar. **Kr. 125.000,-**



**MERCEDES-BENZ E300 AUT. SVARTUR**
Árg 1997, Km 121.000. mynd manglar. **Kr. 290.000,-** Selist fyri kunda.



**CITROEN XSARA 2,0HDI**
Árg 2002, Km 59.000. mynd manglar. **Kr. 139.000,-**



**MERCEDES C180 ELEG. LEÐUR/KLIMA**
Árg 1995, Km 194.000. *Prísur fyrr Kr. 169.000* – **Nú sertilboð uttan bil í býti 125.000,-**



**CITROEN XSARA PICASSO 1,6I**
Árg 2004, Km 22.000. mynd manglar. **Kr. 165.000,-** Selist fyri kunda.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo • e-mail: ivan@ivan.fo

# Rúsdrekkalógin skal tálma nýtsluni

**– Fyri mong í okkara samfelag er tað hugstoytt at staðfesta, at tað støðugt verða gjørdar royndir at liberalisera rúsdrekkalógina. Skipanin við einkarsølu er fyri Miðflokkin á ongan hátt tann besta skipanin, men staðfestast má, at ávísar avmarkingar hóast alt eru við verandi skipan, sigur Bill Justinussen, sum í dag fer at seta Bjarna Djurholm**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Ein avmarkandi rúsdrekkalóg eigur at steðga vøkstrinum í miðalnýtsluni og heldur virka minkandi, men so er ikki, staðfestir Bill Justinussen*

Fyri stuttum boðaðu føroyskir fjølmiðlar frá, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur ætlanir um at leggja fyri tingið uppskot til broytingar í rúsdrekkalógini. Eisini varð sambært fjølmiðlunum boðað frá, at hesuferð væntaði landsstýrismaðurin, at ein meiriluti fór at vera á tingi fyri hesum broytingum.

_ Fyri mong í okkara samfelag er tað hugstoytt at staðfesta, at tað støðugt verða gjørdar royndir at liberalisera rúsdrekkalógina. Skipanin við einkarsølu er fyri Miðflokkin á ongan hátt tann besta skipanin, men staðfestast má, at ávísar avmarkingar hóast alt eru við verandi skipan. Hesar avmarkingar skuldu ætlandi gera sítt til, at nøkur færri gjørdust trælir undir rúsdrekka. Tó vísa hagtølini týðiliga, at ein støðug øking er í miðalnýtsluni, og tí virkar verandi rúsdrekkalóg ikki eftir sínum endamáli, sum er avmarkandi. Ein avmarkandi rúsdrekkalóg eigur at steðga vøkstrinum í miðalnýtsluni og heldur virka minkandi, men so er ikki, staðfestir Bill Justinussen.

Hann sigur, at tað undrar seg almikið at hoyra í fjølmiðlunum, at landsstýrismaðurin, sum umsitur hetta sera týðandi økið, vil arbeiða fyri størri atkomiligheit.

Tí fer hann á tingfundinum í dag at spyrja landsstýrismannin, um samgongan hevur ítøkiligar ætlanir um at fremja broytingar í rúsdrekkalógini. Um so er, vil hann hava at vita, hvørjar hesar broytingar eru, og hvørja ávirkan landsstýrismaðurin ætlar, at tær skulu hava á samlaðu rúsdrekkamisnýtsluna.

Bill Justinussen spyr eisini, um landsstýrismaðurin ætlar at taka nøkur stig til at steðga teirri líðandi økingini í samlaðu rúsdrekkamisnýtsluni?